LISA fingið búmerki:

# Moyggin hjá Williami Heinesen uppí part

**Búmerkjakappingin, sum Listafólkasamband Føroya, LISA, skrivaði út fyri nøkrum mánaðum síðani er komin at enda, og nú er ein vinnari kosin. Vinnarin vann tí búmerkið er vakurt og lættlisið, fangar eygað og lyftir uppskotið á eitt listarligt støði, verður sagt frá LISA**

BÚMERKI
*Ingrid Bjarnastein*

Ingi Joensen kann nú stoltur siga, at hann er skaparin aftanfyri snotuliga búmerkið, ið LISA nú fer at prenta á brævpappír, brævbjálvar og annað.

Tann annan apríl hevði Listafólkasamband Føroya sett freistina til at vera við í búmerkjakappingini, og komu 43 uppskot inn. Hetta var eisini gjørt í samband við 20 ára dagin hjá felagnum.

Í nevndini, sum hevur valt búmerkið út sótu Oddfríður M. Rasmussen, Jenny Petersen og Jens Fredriksen frá LISA, og harafturat trý utanveltað, sum vóru Gunnar Hoydal, Maifinn Norðoy og Jan Andersen.

– Vit hugdu øll uppskotini í gjøgnum og síðani valdu vit eini 7-8 burturúr, sigur Oddfríður M. Rasmussen, sum umframt at hava verið við til at velja búmerkið, er formaður í LISA.




*Ingi Joensen vann búmerkjakappingina hjá LISA, og fekk ein kekk uppá 15.000 krónur*
*Mynd: Finnur Justinussen*

### Limur í LISA

Ingi Joensen, sum sjálvur er virkin og limur í LISA, átti vinnandi uppskotið. Búmerkið er blátt og hevur gular stavir. Annar bókstavurin "I" er ein moyggj, sum er verk hjá Williami Heinesen.

– Sjálvur haldi eg, at hugskotið var upplagt, sigur Ingi Joensen. – William Heinesen var uppi í næstan øllum listarligum arbeiði, og tí valdi eg at finna fram til okkurt konufólk av Williami, sum ein so eisini kundi knýta til konufólkanavnið LISA.

Ingi veit ikki rættiliga, hvussu langa tíð hann hevur brúkt uppá, at gera búmerkið, men hann sigur, at nógv tíð, millum annað er farin við at finna fram til konufólk, sum hann kundi brúka. Men hugskotið kom beinanvegin, og síðani var bara eftir at spæla sær við tankanum.

Virðislønin frá LISA var ein kekkur uppá 15.000 krónur.

Stjørnuskotið Brandur Enni:

# Glaður fyri at vera væl móttikin

**Brandur Enni hevur seinasta vikuskiftið havt konsertir á Kambsdali og í Suðuroy. Í gjárkvøldið skuldi vera konsert í Badmintonhøllini í Havn, og allar hesar konsertir eru so væl umtóktar, at eykakonsert verður á skránni sunnudagin**

TÓNLEIKUR
*Ingrid Bjarnastein*

Hann er smæðin, tað hoyrist týðiliga í telefonini fríggjamorgunin, tá Sosialurin fekk eitt morgunprát við unga stjørnuskotið Brand Enni.

Hann hevur havt nakrar konsertir á Kambsdali og í Suðuroy, og í gjárkvøldið skuldi konsert vera í Badmintonhøllini í Havn. Henda konsert er útseld, og tí er skipað fyri eykakonsert sunnudagin klokkan 17.00.

Vit spurdu Brand, hvussu tað kennist, at vera eitt tannáringa-popp-idol fyri øllum teimum ungu gentunum í Føroyum. Brandur svarar:

– Eg haldi ikki, at eg eri eitt poppidol fyri allar, kanska bara fyri nakrar.



*Brandur Enni, nýggja stjørnuskotið í føroyska tónleikaheiminum, noyðist at halda eykakonsert sunnudagin. Eisini skal hann til Íslands, har eini 40.000 fólk fara at hoyra hann syngja*

Brandur leggur afturat, at hann er glaður fyri at fólk taka so væl ímóti sær og tónleikinum. Tað kemur eisini fyri, at fólk steðga honum á gøtuni fyri at tosa við hann, men sigur hann, at tað er ikki so nógv av tí.

### Til Íslands

Tann 14. juni fer Brandur til Íslands, har hann skal spæla á Tjóðardegnum tann 17. juni. Tann konsertin verður mitt í Reykjavík og væntað verður, at millum 30 og 40.000 fólk koma at hoyra Brand tá. So hetta skuldi verið einupplagdur møguleiki at fáa tónleikin hjá Brandi uttanlands.

Frá Steintór Rasmussen frætta vit, at konsertirnar, sum higartil hava verið, hava gingið væl, og konsertin, sum verður sunnudagin, er so tann síðsta finalan, sum verður áðrenn Brandur fer til Íslands, og lovar hann eina spennandi framførslu.

Tórshavnar Bátafelag:

# Nevndin afturvald

AÐALFUNDUR

Tórshavnar Bátafelag hevði sín árliga aðalfund tann 22. apríl. Øll nevndin varð afturvald, og á nevndar fundi tann 5. maj skipaði nevndin seg á sama hátt sum frammanundan og sær soleiðis út:
Kartni Olsen, formaður
Øssur Hjalt, næstformaður
Alvi Nielsen, kassameistari
Páll Klein, skrivari
Erhard Mortensen, nevnarlimur
Eykalimir eru Petur Jensen og Jegvan Bæk.

Bátafelagið er eitt virkið felag, og limatalið, sum táttar í tey 600 er støðugt vaksandi. Felagið arbeiðir við at betra umstøðurnar hjá øllum bátaeigarum í kommununi, og skipar fyri ymsum hugnaligum tiltøkum fyri limirnar, serstakliga siglingartúrum kring oyggjarnar. Hesir túrar hava verið so væl umtóktir, at nú verður felagið boðið at koma at vitja á ymsum plássum. Til dømis fer felagið til Hvalbiar tann 8. juni. Ætlanin er at gera fleiri túrar í summar, og teir verða lýstir í hølum felagsins.

Ein afturvendandi táttur er árligi Bryggjudansurin. Hann verður næsta vikuskifti, tann 1. juni í Vágsbotni. Tá verður sera góður dansur, bæði føroyskur og enskur. Jentoft og vinmenn spæla, og Dansifelag Kaggans skipar fyri føroyska dansinum. Kaffi, sodavatn og okkurt ábit fæst til keyps. Umleið 1000 fólk hugnaðu og stuttleikaðu sær í bryggjudansinum í fjør.

# Ægir inn at bunkra

VAKTARSKIP
*Ingrid Bjarnastein*

Íslendska vaktarskipið Ægir kom inn á Havnina fríggjamorgunin. Vit frætta av havnarskrivastovuni, at teir eru komnir inn at bunkra.

– Hesa tíðina av árinum hava teir vaktarøkið nær tí føroyska markinum, og teir fáa eisini bíligari olju her enn í Íslandi. Tí loysir tað seg betri hjá teimum at koma higar enn at fara til Íslands, sigur Johan Christiansen, havnarfúti.

– Soleiðis fáa teir eisini eina lítla útferð burturúr, og kunnu hitta starvsfelagar sínar á vaktartænastuni í Føroyum um teir hava hug til tess.



*Íslendska vaktarskipið Ægir kom fríggjamorgunin inn á Havnina at bunkra og keypa olju.*
*Mynd: Finnur Justinussen*



# ÁRSROKNSKAPUR 2001

## RAKSTRARROKNSKAPUR

| DKK | 2001 | 2000 |
|---|---|---|
| **TRYGGINGARGJØLD** | | |
| Tryggingargjøld brutto | 272.555.060 | 253.451.512 |
| Endurtryggingargjøld | -55.562.636 | -45.803.204 |
| Broyting í avsettum tryggingargjøldum brutto | -8.142.168 | -3.108.784 |
| Broyting í avsettum tryggingargjøldum hjá endurtryggjarum | -551.453 | 523.113 |
| **Tryggingargjøld netto** | **208.298.803** | 205.062.636 |
| **Rentuinntøka av tryggingarvirksemi** | **8.429.636** | 9.449.389 |
| **SKAÐAENDURGJØLD** | | |
| Útgoldið fyri skaðar brutto | -152.085.410 | -216.234.062 |
| Endurtryggjaranna partur | 12.433.877 | 43.455.752 |
| Broyting í avsettum skaðaendurgjøldum brutto | -9.111.272 | 3.999.127 |
| Broyting í avsettum skaðaendurgjøldum hjá endurtryggjarum | 8.310.477 | -1.204.216 |
| **Skaðaendurgjøld netto** | **-140.452.328** | -169.983.398 |
| **RAKSTRARÚTREIÐSLUR AV TRYGGINGARVIRKSEMI** | | |
| Nýtekningarútreiðslur | -143.608 | -159.127 |
| Fyrisitingarútreiðslur | -69.298.779 | -63.443.518 |
| Ómaksløn og avlopsbýti frá endurtryggjarum | 4.070.731 | 3.342.924 |
| **Rakstrarútreiðslur av tryggingarvirksemi netto** | **-65.371.656** | -60.259.721 |
| **Broyting í útjavningarburturleggingum** | **-9.000.000** | 0 |
| **ÚRSLIT AV TRYGGINGARVIRKSEMI** | **1.904.454** | -15.731.094 |
| **INNTØKUR AV ÍLØGUOGNUM** | | |
| Vinningur av kapitalpørtum í tilknýttum fyritøkum | 745.995 | 423.266 |
| Fastogn | 3.002.587 | 2.746.440 |
| Rentur og vinningsbýti v.m. | 74.629.080 | 78.646.672 |
| Staðfestur vinningur av íløguaktivum | 0 | 4.409.373 |
| **Inntøkur av íløguognum tilsamans** | **78.377.661** | 86.225.752 |
| Ikki staðfestur vinningur av íløguognum | 0 | 4.747.441 |
| **ÚTREIÐSLUR AV ÍLØGUOGNUM** | | |
| Fyrisitingarútreiðslur | -4.570.094 | -1.914.199 |
| Rentuútreiðslur | 0 | 0 |
| Staðfest tap av íløguognum | -7.441.606 | 0 |
| **Útreiðslur av íløguognum tilsamans** | **-12.011.701** | -1.914.199 |
| **Ikki staðfest tap av íløguognum** | **-3.959.808** | 0 |
| **Renta flutt til tryggingarvirksemi** | **-8.429.636** | -9.449.389 |
| **ÚRSLIT AV ÍLØGUOGNUM TILSAMANS** | **53.976.517** | 79.609.605 |
| **AÐRAR UPPHÆDDIR** | | |
| Aðrar vanligar inntøkur | 1.149.802 | 1.418.019 |
| Aðrar vanligar útreiðslur | -3.284.366 | -3.513.366 |
| **Aðrar upphæddir tilsamans** | **-2.134.565** | -2.095.348 |
| **Úrslit áðrenn óvanligar upphæddir og skatt** | **53.746.406** | 61.783.164 |
| **AÐRAR ÓVANLIGAR UPPHÆDDIR** | | |
| Óvanligar inntøkur | 0 | 0 |
| Óvanligar útreiðslur | 0 | 0 |
| **Aðrar óvanligar upphæddir tilsamans** | **0** | 0 |
| **ÚRSLIT ÁÐRENN SKATT** | **53.746.406** | 61.783.164 |
| Skattur | -9.131.088 | -9.468.623 |
| **RAKSTRARÚRSLIT** | **44.615.318** | 52.314.541 |

Ársroknskapurin er styttur. Fullfíggjaður ársroknskapur er atkomuligur hjá Tryggingarfelagnum Føroyum og tí føroyska skrásetingarmyndugleikanum.

## FÍGGJARSTØÐA

| DKK | 2001 | 2000 |
|---|---|---|
| **OGN** | | |
| **Íløguognir** | | |
| **Fastogn** | **79.291.311** | 66.042.889 |
| **KAPITALPARTAR** | | |
| Kapitalpartar í tilknýttum fyritøkum | 17.231.144 | 16.485.149 |
| Kapitalpartar í øðrum fyritøkum | 32.210.450 | 5.210.450 |
| **KAPITALPARTAR TILSAMANS** | **49.441.594** | 21.695.599 |
| **FÍGGJARÍLØGUR** | | |
| Partabrøv | 53.025.016 | 63.953.292 |
| Lánsbrøv | 875.263.941 | 819.141.163 |
| Útlán | 312.332.655 | 244.072.227 |
| Innlán | 21.955.136 | 142.823.269 |
| **FÍGGJARÍLØGUR TILSAMANS** | **1.262.576.748** | 1.269.989.950 |
| **ÍLØGUOGNIR TILSAMANS** | **1.391.309.654** | 1.357.728.438 |
| **ÁOGN AV TRYGGINGARVIRKSEMI** | | |
| Hjá tryggingartakarum | 20.781.306 | 9.697.075 |
| Hjá tryggingarfeløgum | 4.716.303 | 5.026.694 |
| **ÁOGN AV TRYGGINGARVIRKSEMI TILSAMANS** | **25.497.609** | 14.723.769 |
| **AÐRAR OGNIR** | | |
| Innbúgv, EDV-útgerð, akfør v.m. | 30.802.301 | 24.048.950 |
| Annað | 72.180 | 77.018 |
| **AÐRAR OGNIR TILSAMANS** | **30.874.480** | 24.125.968 |
| **TÍÐARAVMARKINGAR** | | |
| Rentur og leiga tilgóðar | 19.075.200 | 14.861.713 |
| Aðrar tíðaravmarkingar | 3.292.395 | 3.272.284 |
| **TÍÐARAVMARKINGAR TILSAMANS** | **22.367.595** | 18.133.998 |
| **OGN TILSAMANS** | **1.470.049.338** | 1.414.712.173 |

| DKK | 2001 | 2000 |
|---|---|---|
| **SKULD** | | |
| **EGINOGN** | | |
| **EGINOGN TILSAMANS** | **1.213.298.865** | 1.168.683.547 |
| **TRYGGINGARTEKNISKAR AVSETINGAR** | | |
| Avsett tryggingargjøld | | |
| Avsett brutto | 41.889.297 | 33.747.129 |
| Endurtryggjaranna partur | -2.175.506 | -2.726.959 |
| **Avsett tryggingargjøld netto** | **39.713.791** | 31.020.170 |
| **AVSETT SKAÐAENDURGJØLD** | | |
| Avsett brutto | 175.598.515 | 166.487.243 |
| Endurtryggjaranna partur | -30.609.175 | -22.298.698 |
| **Avsett skaðaendurgjøld netto** | **144.989.340** | 144.188.545 |
| **Útjavningarburturlegging** | **9.000.000** | 0 |
| **TRYGGINGARTEKN. AVSETINGAR TILS.** | **193.703.131** | 175.208.714 |
| **AÐRAR AVSETINGAR** | | |
| Avsett til útsettan skatt | 3.442.031 | 4.297.783 |
| Avsett til eftirlønarskyldur | 9.067.852 | 8.829.336 |
| Avsett samanleggingarkostnað | 0 | 6.314.989 |
| **AÐRAR AVSETINGAR TILSAMANS** | **12.509.883** | 19.442.109 |
| **ONNUR SKULD** | | |
| Skattur | 9.986.840 | 5.170.840 |
| Annað | 40.550.619 | 46.206.963 |
| **ONNUR SKULD TILSAMANS** | **50.537.459** | 51.377.803 |
| **SKULD TILSAMANS** | **1.470.049.338** | 1.414.712.173 |

**STJÓRN**
**Gunnar í Liða,** forstjóri
**Mortan Poulsen,** stjóri

**NEVND**
**Jógvan Durhuus,** formaður
**Trygvi F. Guttesen,** næstformaður
**Birgir Mohr,** 2. næstformaður
Jógvan Lützen
Arngerð Persson
Ronald Poulsen
Anna Maria Simonsen
Emil Simonsen
Jákup Sólstein

**GRANNSKOÐANARÁTEKNING**
Vit hava grannskoðað ársroknskapin, greiddur av leiðsluni, fyri Tryggingarfelagið Føroyar fyri árið 2001.

**UM GRANNSKOÐANINA**
Í samsvar við alment viðurkendar grannskoðanarreglur er grannskoðanin skipað og framd við tí endamáli at fáa eina grundaða sannføring um, at tað ikki eru týðandi feilir ella vanta týðandi upplýsingar í roknskapinum. Undir grannskoðanini hava vit, eftir meting um týdning og risiko, kannað grundarlag og prógv fyri upphæddir og aðrar upplýsingar í roknskapinum. Vit hava samstundis tikið støðu til roknskaparháttin og roknskaparligu metingarnar, sum leiðslan hevur gjørt, eins og vit hava mett, um upplýsingarnar í roknskapinum sum heild eru nøktandi.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

**NIÐURSTØÐA**
Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin er greiddur í samsvar við roknskaparkrøv í løggávuni, og at hann gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ogn og skuld, fíggjarligu støðu og úrsliti.

Tórshavn, tann 3. mai 2002

**Rasmussen & Weihe**
Statsaut. grannskoðarafelag P/F
Klaus Rasmussen/
*statsaut. revisor*
Joen Magnus Lamhauge
*reg. revisor*

**Grannskoðaravirkið**
***INPACT P/F***
Jógvan Amonsson/
*statsaut. revisor*
Jógvan Joensen
*cand. merc. aud.*

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
Kongabrúgvin
Postboks 329
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
Tel 345600
Fax 345601
tf@trygging.fo
www.trygging.fo